# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Win or die trying*

*Luiz Felipe Scolari*

# Aganevndin kolldømd

**Yvirkærunevndin hjá FSF hevur ógildað avgerð hjá Aganevndini, sum annars hevði dømt MB at vinna dyst móti 07 Vestur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um rættiliga prinsipiella avgerð, har Yvirkærunevndin staðfesti, at ein spælari í vaksnamannadeildini í prinsippinum situr leikbann av sær í fyrst komandi dystinum, sum hann hevur loyvi at luttaka í. Eisini hóast hetta ikki er í somu deild, sum spælarin fekk kortið.

Upprunaliga endaði dysturin millum 07 Vestur og MB í 2. deild við 2-1 sigri til 07 Vestur, men MB kærdi dystin. Hetta tí spælari hjá 07 hevði fingið reytt kort, tá liðið seinast spældi. Og Aganevndin gjørdi í sínari viðgerð av, at spælarin ikki hevði loyvi at spæla.

07 Vestur helt hinvegin fast um, at spælarin hevði sitið leikbannið av sær. 1. deildarliðið hjá felagnum hevði nevnliga spælt, og har hevði spælarin loyvi at spæla. Og júst hetta var avgerandi, tá Yvirkærunevndin tók avgerð í málinum.

Hetta er annars næsta ferðin í tvey ár, at Yvirkærunevndin ógildar avgerð hjá Aganevndini. Fyrru ferðina var í fjør, tá Skála í fyrsta umfari varð dømt at tapa landskappingardyst í Formula-deildini móti B36. Men eisini ta ferðina varð úrskurðurin hjá Aganevndini ógildaður.

Úrskurðurin hjá Yvirkærunevndini sæst í fullum líki á heimasíðuni hjá Fótbóltssambandinum.




*Enn tykist nýggi bygnaðurin innan føroyskan fótbólt ikki veruliga hava funnið sítt felags stev. Leygardagin var aftur dømi um, hvussu mál verða tulkað ymiskt av Aganevndini og Yvirkærunevndini innan FSF*

# Tey bestu í miðjuni

**Eftir at talan var um lutakast á norðoyastevnu eru tað nú úrslitini við seinasta róður, sum gera av, hvussu startrøðin er á sundalagsstevnu**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin er næsti FM-róðurin í ár á skránni. Hesa ferð verður róð í Hósvík, har 44 bátsmanningar hava boðað frá luttøku. Vert er at bíta merki í, at fýra bátar hesa ferð eru meldaðir til róðurin hjá 6-mannaførum við kvinnum. Tann róðurin skuldi verða av ongum seinast, men onkursvegna vóru kortini tvær manningar við í róðrinum.

Undan FM-róðrunum verður eisini talan um barnaróðrar, har 19 manningar taka lut.

**Startrøðirnar eru hesar:**




*Tá startrøðin er løgd eftir úrslitunum, liggja fremstu bátarnir ætlandi lið um lið*

**Barnaróður, dreingir**

| | |
|---|---|
| 5 | Blikur |
| 6 | Frúgvin |
| 7 | Spógvin |
| 8 | Jallurin |
| 9 | Teistin |
| 10 | Junkarin |
| 11 | Títlingur |
| 12 | Havfrúgvin |

**Barnaróður, gentur**

| | |
|---|---|
| 4 | Falkur |
| 5 | Spógvin |
| 6 | Tjaldrið |
| 7 | Teistin |
| 8 | Ørnin |
| 9 | Frúgvin |
| 10 | Títlingur |
| 11 | Hvassi |
| 12 | Blikur |
| 13 | Kollur |
| 14 | Junkarin |

**5mannafør, dreingir**

| | |
|---|---|
| 5 | Katla |
| 6 | Teistin |
| 7 | Tjaldrið |
| 8 | Havfrúgvin |
| 9 | Sílið |
| 10 | Junkarin |
| 11 | Strípan |
| 12 | Blikur |
| 13 | Tambar (G) |

**6-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 7 | Hósvíkingur |
| 8 | Gongurólvur |
| 9 | Jarnbardur |
| 10 | Lómur |

**5-mannafør, gentur**

| | |
|---|---|
| 6 | Blikur (G) |
| 7 | Jallurin |
| 8 | Hvassi |
| 9 | Drekin |
| 10 | Junkarin |

| | |
|---|---|
| 11 | Firvaldur |
| 12 | Tambar |

**5-mannafør kvinnur**

| | |
|---|---|
| 5 | Havfrúgvin |
| 6 | Katla |
| 7 | Ritan |
| 8 | Frúgvin |
| 9 | Sílið |
| 10 | Erla Kongsdóttir |
| 11 | Teistin |
| 12 | Báran |
| 13 | Blikur |

**6-mannafør menn**

| | |
|---|---|
| 5 | Víkingur |
| 6 | Rádni |
| 7 | Gongurólvur |
| 8 | Tvøråbáturin |
| 9 | Sundabáturin |
| 10 | Riddarin |
| 11 | Lómur |
| 12 | Jarnbardur |

**8-mannafør**

| | |
|---|---|
| 7 | Kvívíkingur |
| 8 | Argjabáturin |
| 9 | Heiðabáturin |
| 10 | Árnfirðingur |
| 11 | Knørrur |

**10-mannafør**

| | |
|---|---|
| 8 | Havnarbáturin |
| 9 | Ormurin |